# Neistin styrkir seg til finaluna



*Við skotsterka vinstra arminum kann Annika Thomsen væl gerast ein av heilt týðandi Neista-spælarunum í kvinnufinaluni leygardagin*

**Birita Wardum kemur heim at styrkja um hópin, sum eisini hevur Ásu á Neystabø á navnalistanum**

KVINNUFINALAN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan var um beiskan bita, tá Neistin í fjør mátti lúta fyri Stjørnuni í finaludystinum. Leingi hevði Neistin tá bestu kortini á hondini, men at enda koppaði javnvágin kortini.

Sama søgan hevur eisini endurtikið seg einar tvær ella tríggjar ferðir síðani tá, og ti skal eingin ivast í, at talan verður um nakrar uppsettar spælarar, sum fara á vøllin leygardagin.

### Loysir seg ikki

Hóast uppsettar, so hava tær í Neistanum tó roynt at fyrireika seg til dystin á vanligan hátt.

– Tað loysir seg nokk sjáldan at blása fyrireikingarnar til slíkar dystir ov nógv upp. Vit vita allar, hvat hetta snýr seg um, og tí mugu vit syrgja fyri at fáa okkara besta spæl fram. Og so ikki meira enn tað, heldur Annika Thomsen, sum væl kann verða ein av heilt týdningarmiklu spælarunum leygardagin.

Hon sigur, at tær høvdu sína seinastu venjing hóskvøldið. Fríggjadagin skuldu tær hittast at síggja seinasta dystin, sum tær spældu móti Stjørnuni, og í aðrar mátar mugu tær so bara fyrireika sum vant.

### Styrktur hópur

Við at hyggja at navnaseðlinum, so sæst kortini, at Neistin hevur lagt nógv fyri í fyrireikingunum til dystin. Birita Wardum, sum hevur verið uttanlands í nøkur ár, men sum spældi við alt grundspælið, kemur heim til dystin. Hartil er Ása á Neystabø nú eisini tøk. Hon breyt annars hondina, tá Neistin seinast spældi móti Stjørnuni, men seinastu vikuna hevur hon vant, og hon verður tí helst í hópinum. Hartil hevur eisini verið tosað um at fáa Anniku Ljósstein heim til dystin, men tann ætlanin er so slept, skilst. Tað kundi annars verið eitt lítið kuriosum í hesum, tá Annika hevur fingið sína hondbóltsuppaling í Stjørnuni.

### Halda góðu gongdini

Tá tosið fellur inn aftur á sjálvan dystin, heldur Annika, at tær fyrst og fremst mugu hugsa um seg sjálvar í fyrireikingunum.

– Tað hevur gingið væl seinastu dystirnar. Eftir at vit í fyrru hálvfinaluni móti StÍF spældu ein vánaligan dyst, hava vit veruliga lyft okkum. Spælið hevur koyrt væl, og tað verður eisini neyðugt leygardagin. Uppskriftin verður tann vanliga, har vit fyrst og fremst skulu fáa verjuna at rigga, og síðani kunnu vit so byrja at hugsa um álopspartin, heldur hon.

– Vit vilja í øllum førum gera alt tað, sum vit eru mentar, soleiðis at tað hesa ferð verður okkara túrur at lyfta steypinum, slær Annika Thomsen fast at enda.

## Dystir um vikuskiftið

**Coca-Cola kappingin, finalur**

**Kvinnur**

| Dagur | Kl. | Dystur | Dómarar |
|---|---|---|---|
| 11.02 | 15.00 | Neistin-Stjørnan | Heri Petersen & Dánjal Samuelsen |

**Menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 11.02 | 17.00 | VÍF-StÍF | Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen |

**Flogbóltur**

**Meistaradeild kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 12.02 | 14.00 | KÍF-Mjølnir | ÍF |
| 12.02 | 15.00 | TB-SÍ | Dráttur |

**Meistaradeild menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 12.02 | 16.00 | Nøvan-Mjølnir | SÍ |

# Stjørnan vil eiga steypið

**Sleppur Una Olsen aftur í ár upp á pallin eftir Coca-Cola steypinum, fær Stjørnan samstundis steypið til ognar**

KVINNUFINALAN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tvær tær seinastu steypafinalurnar hevur Una Olsen lyft Coca-Cola steypið. Ger hon tað aftur hesaferð, er steypið ogn hjá Stjørnuni*

Í Klaksvík royna spælararnir at gera sum minst burturúr, at dysturin leygardagin er eitt sindur meira serligur enn aðrir dystir.

Sum so kunnu tær kanska eisini taka tað nakað róligt, tí hetta at spæla avgerandi dystir er so ikki nakað nýtt fyribrigdi hjá liðnum. Tær hava at kalla verið fastur partur av føroysku hondbóltsoddinum seinastu fimm-seks árini. Og tey bæði seinnu árini hevur hetta givið úrslitið í millum øðrum tveimum vunnum steypafinalum.

Hugurin at spæla finalur hvørvur tó ikki, bara tí spælarar eru vanar við hetta. Og Una Olsen, liðskipari á liðnum, er eisini skjót at staðfesta, at tær eru spentar til dystin.

– Tú verður ongan tíð troytt av at spæla slíkar dystir. Um nakað, so er talan um ein enn meira serligan dyst hesaferð. Vinna vit, so hava vit jú vunnið steypið trý ár á rað, og tí kunnu vit tryggja okkum tað til ognar, sigur hon.

### Í finalu kann alt henda

Finalusigurin fyri einum ári síðani kom til høldar eftir dyst móti Neistanum, sum jú eisini er mótstøðuliðið leygardagin. Ta ferðina vóru tað tó leingi tær bláu, sum høvdu munin, men at enda knógvaðu reyðu stjørnurnar kortini mótstøðuni. Ein dystargongd, sum eisini hevur endurtikið seg einar tvær-tríggjar ferðir, tá Stjørnan og Neistin hava spælt.

Vísandi til hetta slær Una eisini fast, at talan ikki verður um nakran lættan dyst.

– Tað plagar jú at verða tikið til, at ein finala er ein finala. Tað er bara ein dystur, har alt verður avgjørt, og tí kann alt henda. Og Neistin hevur eisini eitt gott lið. Talan hevur ofta verið um sera tættar dystir móti teimum seinasta árið. So vit taka einki fyri givið.

### Hugsa ikki sum favorittar

Skal metast um sannlíkið undan dystinum, so munnu tey flestu nokk meta Stjørnuna sum favoritt til steypið. Bæði tí Stjørnan í landskappingini hevur sýnt seg sum sterkasta liðið. Men kanska eisini, tí Neistin enn ikki hevur megnað at bast klaksvíkarkvinnunum, hóast møguleikin onkra tíð hevur verið heilt stórur. Nakað, sum kanska bendir á, at Stjørnan er tað avgerandi pettið kaldari, tá avgerandi støðurnar í dystinum eru.

Una vil sum so ikki avvísa, at hetta ger Stjøruna til favorittar. Men hon avsannar púrasta, at hetta er nakað, sum spælararnir taka til sín.

– Tá úrslitini hava verið, sum tey hava verið, so eru vit kanska betra liðið á pappírinum. Og sum so trívast vit ikki illa sum favorittar.

– Men tú skalt eisini minnast til, at Neistin hevur eitt fint hondbóltslið, sum hevur havt sera góð úrslit seinastu tíðina. So talan verður um ein knallharðan dyst. Tað ræður um at koma væl ígongd við dystin uttan ov nógvar nervar. Og so má verjan fáast at rigga alt fyri eitt. Ger hon tað, so plagar restin av spælinum at fylgja við av sær sjálvur, sigur liðskiparin hjá Stjørnuni. Ein liðskipari, sum vónar, at hon leygardagin fyri triðu ferð á rað kann lyfta stór steypið upp móti stjørnunum.